# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Heiður og viðkenning til tónleikalív

Í hesum døgum er kunngjørt, at kendur danskur grunnur, Jacob Gades Legat, hevur avgjørt at lata fleiri føroyskum tónleikarum viðurkenning fyri sítt arbeiði. Her er talan virðis- og heiðurslønir,sum bara staðfesta tað, sum vit longu hava vitað: at vit í Føroyum eiga sera dugnaligar tónleikarar og eitt sera gott tónleikaumhvørvi. Tillukku øll somul.

Slík viðurkenning er eisini ein staðfesting av, at tann innsatsur og tær íløgur, sum eru gjørdar seinastu mongu árini í føroyskt tónleikalív, hava verið rættar. Hetta er ikki minst okkara musikskúlum fyri at takka, og eisini eigur Norðurlandahúsið stóran lut í hesum.

Nú nógv verður gjørt fyri at útflyta føroyskan tónleik eisini, og her hevur Tutl stórar ætlanir so skulu vit heldur ikki gloyma, at føroyskir tónleikarar og tónleikur eru at meta sum avbera góðir ambassadørar fyri tjóð okkara. Tí eiga vit ikki at undirmeta tað arbeiði, sum verður lagt í okkara ungu fólk frá musikskúlum og øðrum.

At myndugleikarnir eru við til at skapa karmar er tí sera umráðandi, og er tað gleðiligt, at tær størstu kommunurnar í landinum, Havnar og Klaksvíkar kommunur, vísa tónleikinum størri ans við at betra um karmarnar.

Vit síggja eisini fegin, og vilja her taka saman hendur við tónleikalivinum her á landi, og heita á okkara háttvirda løgting um at síggja álvaran í tí at gera íløgur í føroyskt tónleikalív. Hesin parturin av føroysku fólkasálini er eins týdningarmikil sum tann infrastrukturur, sum tingmenn dag og dagliga leggja so stóran dent á og hava gjørt tað í mong mong ár. Gevið okkara tónleiki og tónleikarum eins stóran ans. Takið við í tykkara metingar og játtanir á komandi fíggjarlóg, at tónleikurin skal hava bestu umstøður og gerið eins og danski grunnurin, setið pengar av til at menna tónleikin. Tá virða tit fólkið, og tit vilja fáa tøkkina fyri hetta. At vera við til skapar góðar karmar og ala upp góðar tónleikarar er tann største gávan, sum okkara politikarar kunnu lata hesum lítla og góða samfelag.

Vónandi fara vit komandi tíðina at fáa nógv kreativ boð frá komandi valevnum og flokkum um, hvussu tey vilja fremja og menna føroyskan tónleik. Frá tí smáa til tað stóra. Gott í tykkum - raðfestið tónleikin høgt.

**Sosialurin**

## Sama rætt og frælsi at virka, velja og virðast

HØGNI HOYDAL



**Vit skulu hava hjørtuni, hugsjónirnar og virðini inn í føroyskan politikk. Í løtuni er alt læst fast í gomlum fordómum og bindingum**

Eg eri tjóðveldismaður. Og eg eri rættiliga errin av at vera partur av Tjóðveldinum og tjóðveldishugsjónini.

Tað, sum hinvegin pínir meg, er, at tjóðveldisfólk oftast verða sett í bás sum okkurt, ið bara er í andsøgn til Danmark og alt, ið danskt er. At vit støðugt skulu hoyra hesar fordómar og skeivu útleggingarnar av, hvat Tjóðveldið stendur fyri. Og nýta orku at afturvísa skeivum uppáhaldum og og ímyndaðum vansum við at taka fulla ábyrgd av landinum.

Vit skulu ikki fara í verjustøðu, tá vit geva loysingini og fullveldinum innihald. Vit skulu viðgera teir mongu fyrimunirnar og møguleikarnar, sum lata seg upp, og bara kunnu vinnast, tá vit taka okkara frælsi og ábyrgdina av hesum landi.

Tjóðveldi snýr seg um greið mál, virðir og hugsjónir, bygd á rættindi og fólkaræði:

**Sjálvsvirðing og samleiki í heiminum:**
Føroyingar skulu hava sama rætt til at virka í heiminum sum onnur fólk. Vit skulu samstarva við hvønn vit vilja, gera avtalur við hvønn vit vilja og taka somu ábyrgd í heiminum sum onnur. Okkara mál, mentan og samleiki skal virðast og mennast á jøvnum føti við onnur. Soleiðis vinna vit sjálvsvirðing, soleiðis virða vit onnur og soleiðis skapa vit eitt eitt nútímans og fjølbroytt samfelag, ið ikki goymir seg fyri umheiminum.

**Hvør einstakur hevur sama rætt til frælsi:**
Hvør einstakur skal hava sama rætt og frælsi til at velja, virka og virðast í Føroyum, um vit taka við somu skyldum og ikki gera okkum inn á frælsið hjá øðrum. Ongin samfelagsbólkur ella einstaklingur skal hava framíhjárættindi í samfelagnum. Uttan mun til um vit eru kvinnur ella menn. Ung ella eldri. Um vit eru fødd rík ella fátøk. Um vit bera brek ella sjúku. Um vit búgva ymsastaðni í landinum. Um vit hava ymsan húðarlit, trúgv, uppruna ella kærleikslív.

**Óheftur búskapur:**
Frælsi hjá øllum at virka skal kjølfestast í ein sjálvberandi búskap, ið er óheftur av studningi uttaneftir, men bygdur á samhaldsfastar og rættvísar skattaog avgjaldsskipanir, langtíðarjavnvág og ábyrgd fyri komandi ættarliðum.

**Rættartrygd og avleiðingar:**
Rætturin hjá øllum til at velja, virka og virðast skal tryggjast í grundlóg og einum vælvirkandi fólkaræði og rættarsamfelag. Har øll fáa rættvísa viðgerð mótvegis myndugleikunum. Og har øll, ið taka avgerðir standa til svars, og brot á lógir, reglur og rættindi fáa avleiðingar.

**Frælst vinnulív uttan serrættindi**
Frælsi hjá øllum at velja og virka skal grundast á eitt veruliga frælst vinnulív, óheft av politiskum serrættindum til útvaldar einstaklingar, bólkar og útvaldar vinnur. Har dugnaskapur, førleiki og virðing fyri avtalum, lógarkørmum, umhvørvi og trivnaði eru avgerandi fyri møguleikan at dríva vinnu innan fjølbroytt økir og kasta av sær til samfelagið.

**Sosialt rættvísi og vælferð:**
Frælsi hjá øllum at velja, virka og virðast skal styrkjast í sosialt rættvísum vælferðar- og heilsuskipanum, ið øll fíggja í felag eftir evnum, men fáa gagn av eftir tørvi. Stórar broytingar skulu gerast komandi árini á hesum øki til tess at broyta eina strivna og skrivstovuvaldamerkta sentralskipan til skapandi og fjøltáttað hjálpar- og trivnaðartilboð til borgaran.

**Fræls mentan, útbúgving og gransking**
Frælsi hjá øllum at velja, virka og virðast skal taðast og alast við stórum íløgum í mentanararbeiði og mentanartilboð í breiðastu merking: Nútímans og fjølbroyttir dagstovnar, skúlar, útbúgvingar, granskingarstovnar, frítíðartilboð, mentanarstovnar og skapandi list á altjóða støði.

**Frælsi hjá okkara eftirkomarum:**
Frælsi hjá øllum at velja, virka og virðast skal tryggjast við framsóknum umhvørvis-, orku og náttúrupolitikki bæði heima og í altjóða samstarvi, sum kann broyta sjálvsøknu ovurnýtsluni av jarðarinnar tilfeingi hjá okkara ættarliði og okkara heimsparti til ein møguleika hjá nýggju ættarliðunum at byrja á øðrum grundarlagi.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.